# TILTØK

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Helga Abrahamsen. Sunnudagin kl. 17 Møti við Erland, Niels Martin og Regin. Barnamøti kl. 17. Páskastevnan verður í døgunum 24.-28. mars. Les meira á www.keldan.fo

**Missiónshúsið á Selatrað**
Sunnudagin kl. 15.30 Møti v/ John S. Myllhamar, trúboðara. Innsavning til arbeiðið.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Møti verður sunnudagin kl. 18 við Petur A. Jacobsen. Ungdómsmøti verður kl. 21 við bíbliubólkinum hjá teimum yngru.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 13.30 møtir Barnakórið, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Sangmøti, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Hjalgrím Davidsen.

**Betesda, Klaksvík**
Osvald Kjærbo og Svein Petersen tala á evangeliska fundinum kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Saron, Viðareiði**
Evangel. fundur verður í Saron fríggja- og leygarkvøldið kl. 20. Osvald Kjærbo og Svein Petersen tala og syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti við Ólavur Mittún. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti vegna missiónsvikuna í Húsavík. Mánakvøldið kl. 19 savnast ungdómurin frá 7. fl. og eldri. Hjartaliga vælkomin. Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími. Hóskvøldið kl. 20 kemur Sjómanskvinnuringurin saman. Hjartaliga vælkomin.

**Sandoy**
Felagskórið í Sandoynni: Vit taka venjingina uppaftur og byrja í Skopun nú leygardagin kl. 17 í Missiónshúsinum. Øll eru vælkomin at syngja við.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti og kl. 18 Møti við Albert og Helenu.
Missiónsvikan byrjar týskvøldið kl. 20 v/ Jónsvein Bech og Albert Johannesen. Mikukvøldið kl. 20 Møti v/ Torfleif Johannesen, sjómanstrúboðara.

**Frelsunarherurin í Vági**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti og sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Sigrid Ludvig talar.

**Aglow, Suðuroy**
Leygarkvøldið kl. 20 Møti í Frelsunarherinum í Vági. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Lopra**
Møti verður í Lopra sunnukvøldið kl. 20 hjá Terja. Hjartaliga vælkomin.

**Álborg**
Leygarkvøldið 5. mars kl. 19.00 verður evangel. fundur í Betania kirkjuni, Daghammerskjoldsgade 2, Álborg. Talarar: Levi Joensen og aðrir. Eftir fundin bjóða vit góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Evangel. fundir í DK Samkoman Malta**
Fríggjakvøldið 11. mars kl. 19.30 verður evangel. fundur í Sædding Center Sædding, Sædding Esbjerg.
Leygarkvøldið kl. 19 evangel. fundur í Skolehjemmet, Sønderlandevej 28, Sønderborg.
Sunnukvøldið kl. 17 verður evangel. fundur í Staldgårdsgade 4, Vejle. Talarar: Levi Joensen og aðrir. Eftir fundirnar bjóða vit ein góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ørkin, Reykjavík**
Leygarkvøldið 5. mars kl. 20.30 verður hugnakvøld v/ Martin R. Jacobsen.
Sunnudagin 6. mars verður Gudstænasta í Háteigskirkju. M. R. Jacobsen, prestur prædikar. Aftaná verður kaffi á Sjómansheiminum.
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 7. mars:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-17 Seyma fýrkantar saman til teppir
kl. 10-14 Skeið í nálatøving
kl. 14-17 Kortspæl, landastrok, telving o.o. spøl. Tilm. til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491.
**Ólavsøkuframsýning:**
Innsavnan av barnamyndum, lutum o.ø. frá 1920-45 til ólavsøkuframsýningina.
*Týsdagin 8. mars:*
kl. 10.00–11.30: Sangur, Jóhan R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15.00: Frásøgn um Hans Andriasar hús, Hanus Kamban
*Mikudagin 9. mars:*
kl. 10.00–13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 15 Túrur – vitja Hans Andriasar hús
*Hósdagin 10. mars:*
kl. 10.00–10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00–11.45: Enskt talumál, Ásmundur V. Johannesen
kl. 14.00–17.00: Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14.00–16.00: Boccia í kjallaranum. **Bocciakapping verður í høllini á Hálsi í apríl mðr. Tilm. 316491**
*Fríggjadagin 11. mars:*
kl. 10.00–13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou.
kl. 10-14 Skeið í nálatøving
kl. 12.00: Døgurði
kl. 15-17 Felagssangur, býráðsformaðurin hevur orðið. Heðin Mortensen. Speakers corner. Drekka og lagkøka í kjallaranum.
**Føðingardagur – Tilhaldið verður sjey ár 12. mars. Verður hátíðarhildin í dag kl. 15.00.**

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15 – 18.
*Mánadagur 7. mars:*
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
*Týsdagin 8. mars:*
Boccia
*Mikudagin 9. mars:*
Opið hús
*Hósdagur 10. mars:*
Myndaveving fyri áhugað v. Rannvu Gøte.
*Fríggjadagur 11. mars:*
Páskaítriv úr ull v/ Dianu Jacobsen og Gunnvu Justinussen

*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Eldrafelagið Nón**
Týskvøldið 8. mars koma vit saman til hugnaløtu í húsum felagsins kl. 19.30. Vit fáa vitjan av Adelborg Linklett og øðrum.

**Kongshavnar Kvinnufelag**
Helena Petursdóttir heldur almennan fyrilestur um kvinnusjúkur og skiftisárini mánakvøldið 7. mars kl. 19.

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 3320534 ella ein av nevndarlimunum.

**Tilhaldi Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl.- 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Mánadagin 7. mars:*
Maja Horn undirvísir í prikkatøving
*Mikudagin 9. mars:*
Finnbjørn Dam lesur søgu

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Eliaskirkjan.**
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 8 min. at ganga frá Hovedbanegården, 4 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1A, 6A, 14, 15 og 28 steðga nærhendis.
Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32 969995 ella Albin Johannessen, tlf. 32 88 68 79.
E-mail: pr@eliaskirkjan.dk
www.eliaskirkjan.dk

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
Fundir fyri avvarðandi at alkoholikarum er mánakvøld kl. 21.00 á Glyvrum. Í gomlu lærara íbúðini í Glyvra skúla.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

## Brúðarmyndir



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum við sangi, fjarritum, gávum, blómum og við uppringingum gjørdu okkum gullbrúdleypsdagin ógloymandi
**Kærar heilsur Hjørdis og Alberg**

Vit søkja
KT-fólk

fá nærri at vita á
www.farodane.fo

FARODANE
Brekkutún 4 - FO-100 Tórshavn - Tlf. 311414 - farodane@farodane.fo